# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg havi stóra virðing fyri Joe Biden, og eg gleði meg til at sleppa at dystast við hann*

*John McCain*



*Flogvanlukkan í Kirgisistan kravdi 68 mannalív*

*Mynd: AP*

# Bara 24 sluppu við lívinum

**92 fólk vóru í flogfarinum, sum datt niður, beint eftir at tað var farið á flog av Manas-flogvøllinum í Kirgisistan í gjárkvøldið**

Flogfarið hevði júst lætt sær á og skuldi til Teheran í Iran, tá flogskiparin boðaði frá teknsikum trupulleikum. Hann royndi at seta flogfarið aftur, men tað miseydnaðist, og flogfarið datt niður beint við Manas-flogvøllin í kirgisiska høvuðsstaðnum Bisjkek.

92 fólk vóru í flogfarinum, og sambært myndugleikunum í Kirgisistan sluppu bara 24 teirra frá vanlukkuni á lívi. Millum ferðafólkini vóru 17 kirgisiskir kurvabóltspælarar, og sum skilst sluppu sjey teirra livandi frá vanlukkuni. Flogskiparin og ein annar av manningini sluppu eisini frá vanlukkuni á lívi.

Sambært BBC vóru 52 iranar, 33 kirgisar, tríggir kasakstanar, tveir kanadiumenn, ein kinesari og ein turkiskur ríkisborgari í flogfarinum. Kirgisisku myndugleikarnir siga, at flogfarið, sum var av slagnu8m Boeing-737, var smíðað í 1979, og at tað var í góðum standi.

## Enn ein tannáringur myrdur í London

Løgreglan í London stendur at kalla hjálparleys, eftir at fleiri tannáringar eru vorðnir myrdir í býnum í summar. Um vikuskiftið bleiv ein 18 ára gamal drongur funnin myrdur, og hetta er tað 24. tannáringadrápið í London í summar, sigur BBC. Tann 18 ára gamli var stungin, og hóast hann bleiv fluttur á sjúkrahús alt fyri eitt, fingu læknarnir einki gjørt. Ein 20 ára gamal maður er tikin, og hann skuldi avhoyrast í dag.

# Yvirgangsmenn ætlaðu sær til Norðurlond

**Bretska løgreglan hevur tikið tríggjar menn, sum eru undir illgruna fyri yvirgang, og sum ætlaðu sær til Norðurlond**



*Yvirgangur ímóti tokferðsluni kravdi næstan 200 mannalív í 2004. Nú verður kannað, um nyvirgangsmenn høvdu tilknýti til Norðurlond*

*Mynd: Polfoto*

Sambært svenska blaðnum Aftonbladet heldur bretska løgreglan, at ein av teimum trimum monnunum, Omar Romar al-Khalad, er oddamaður fyri bretsku deildini av yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda. Hann og tveir aðrir menn vórðu tiknir á flogvøllinum í Manchester, júst sum teir skuldu fara umborð á eitt flogfar, sum skuldi til Helsingfors, skrivar blaðið.

Bretska blaðið The Times skrivar eisini um handtøkurnar og sigur, at sambært bretsku løgregluni er tað ikki óhugsandi, at menninir hava samband við fólk í Finnlandi, Svøríki, Noregi og Danmark, og at hesin spurningur verður kannaður nú.

Sambært bretskum keldum fekk Scotland Yard illgruna til teir tríggjar menninar, tá ein islamistisk heimasíða í januar í ár kom við drápshóttanum ímóti Tony Blair og eftirmanni hansara, Gordon Brown.

## STUTT SAGT

### Átta hvurvu í skalvalopi

Eit skalvalop á Mont Blanc sunnunáttina tók 18 fól kvið sær. Bjargingarlið funnu rættiliga skjótt átta teirra á lívi, og seinni eydnaðist tað at bjarga tveimum italiumonnum. Hinvegin er at kalla eingin vón um at finna tey seinastu átta á lívi, siga myndugleikarnir í Fraklandi.

Skalvalopið var í 3.600 metra hædd á einum staði fronsku megin fjallið, sum fjallfólk ofta velja, tá tey royna at sleppa niðan á Mont Blanc. Í mong ár varð Mont Blanc roknað sum tað hægsta fjallið í Evropa við sínum 4.807 metrum, men síðani Sovjetsamveldið datt sundur, verður tað 5.642 metrar høga Elbrus í Russlandi roknað sum tað hægsta í Evropa, skrivar NTB.

Franska innanríkisráðið sigur, at eitt ísstykki loysnaði í erva og elvdi til skalvalopið. Sum skilst vóru tey átta, sum hvurvu, bundin saman. Tey tíggju, sum sluppu við lívinum, eru fimm menn úr Fraklandi og fýra menn og ein kvinna úr Italia. Tey eru millum 26 og 37 ára gomul. Øll vórðu flutt á sjúkrahús, men fronsku myndugleikarnir siga, at tey høvdu bara fingið smávegis snuddir.

Sambært BBC eru umleið 100 fólk dottin oman í Alpunum síðani fyrst í juni, og av teimum eru 20 dottin oman á Mont Blanc.

### Pengar til palestinar

Saudiarabia hevur játtað at rinda teimum palestinsku sjálvstýrismyndugleikunum 100 milliónir dollarar, sum tey almennu starvsfólkini kunnu fáa løn, skrivar Reuters. Palestinsku myndugleikarnir hava havt stórar trupulleikar við at rinda sínum starvsfólki løn teir seinastu mánaðirnar.

Á einari ráðstevnu í fjør játtaði Saudiarabia at hjálpa teimum palestinsku myndugleikunum við pengum, um tað gjørdist neyðugt, og nú hevur saudiarabiska fíggjarmálaráðið boðað frá, at pengarnir verða fluttir.